1 d

**Fra:** Dánjal Andreasen [daa@ssl.fo]
**Sendt:** 9. juni 2008 09.00
**Til:** Hilmar Høgenni
**Emne:** VS: upprit til landsstýrisfund um dokking av Smyrli

Hey Hilmar

Sendi hesar spurningar víðari til Conrad sum hevur svara við at skriva sínar viðmerkingar við reyðum millum spurningarnar

Vh
Dánjal

---

**Fra:** Conrad Gaard Joensen
**Sendt:** 6. juni 2008 18.33
**Til:** Dánjal Andreasen
**Emne:** SV: upprit til landsstýrisfund um dokking av Smyrli

Hej Dánjal.

Eg vil eftir besta førimuni prøva at svara.

---

**Fra:** Dánjal Andreasen
**Sendt:** fr 06-06-2008 16:14
**Til:** Conrad Gaard Joensen
**Emne:** VS: upprit til landsstýrisfund um dokking av Smyrli

---

**Fra:** Hilmar Høgenni [mailto:hilmarh@lmr.fo]
**Sendt:** 6. juni 2008 16.07
**Til:** Dánjal Andreasen
**Emne:** VS: upprit til landsstýrisfund um dokking av Smyrli

Hey Dánjal

Eg havi fingið hesar spurningar frá Helenu.

Heilsan

Hilmar

---

**Fra:** Helena Dam á Neystabø
**Sendt:** 6. juni 2008 14.20
**Til:** Hilmar Høgenni
**Emne:** SV: upprit til landsstýrisfund um dokking av Smyrli

Hey Hilmar

Til tess at kunna svara spurningum, sum fara at koma fyri á landsstýrisfundi týsdagin, vil eg fegin vita á leið, hvussu nógv SSL hevur goldið fyri bráðfeingis umvælingar av finnunum í 2007/2008 (bæði til kaving og umvæling).

Bráfeingis umvælingar uppá finnurnar hava fyri 2008 hava veri um eina millión. Fyri 2007 kenni eg ikki tad

nøjagtiga tali, kom í starvi í juni 2007,men vildi mett at tad er um 500.000,-
Fyri tad sum gjørt bleiv í dokkini 2007, skuldi vit ikki gjalda nakad til verksmiduna, bert fyri 2 hjálparar um 50.000,-

Harumframt er tað relevant at spyrja SSL, um vit kunnu hava álit á Mitshubishi fyritøkuni.

Eg velji at hava álit á teimum, teir virka seriøsur og vilja fegnir finna problemi. Problemini koma tá odnarvedur er, og hettar havi eg roynt at lýsa fyri teimum. Tad teir hava ringt vid at skilja er, hvussi extremt vedri er tá tad er ringast. Her havi eg nevnt møguleikan fyri teimum, at minka um viddina á finninum fyri at reducera belastningin, og hettar er ongin trupuleikan.

Tað er hon sum í fleiri umførum hevur veitt trygd fyri, at nú skuldu finnurnar vera í lagi. Hvussu kunnu vit hava álit á, at metingin hjá somu verksmiðju fer at halda hesa ferð. Er tað ikki relevant at spyrja eftir einari "second opinion" í hesum føri.

Royndi at fáa fatur á Jógvan í Dávastovu á Smyril Line, teir hava veri úti í stórum trupuleikum vid finninum á Nørrønu, og hava nú valt at skifta tær út. Kundi veri áhugavert, hvar teir hava fingid vid á vegnum. Takid fatur á hettar mánadagin.

Sum eg skilji frágreiðingina, so helt Mitshubishi at umvælingingarnar á dokkingini í 2007 fóru at vera haldgóðar, men kortini vardi tað minni enn eitt hálvt ár, so var aftur galið. Og tað kann eisini undra, at verksmiðjan ikki vildi royna finnurnar við einum harðari trýsti, meðan skipið var í dokk.

Sum sagt koma trupuleikarnir tá vedri er ringt. Tad ringa vedri kom ikki fyrr enn í slutninginum av feb. fyrst í marts. Mín teori er at finnurnar eru ov stórar. Belastningurin tá skipid høggur, tvs hivar einar 20 metrar upp, fyri so at bresta nidur aftur, er so extremur at ta næstan er ógjørligt at rokna uppá. Tad er sum fyrr nevnt ongin trupuleiki at reducera areali.

Eg ivist nógv í at ein útskifting av bóltum og búsningum – fyri eina so stóra upphædd – fer at loysa trupulleikan. Eg vildi í hvussu so er fegin fingið okkurt slag av trygd fyri, at loysnin er haldgóð. Kann tað t.d. hugsast at finnurnar eru ov stórar, og at veður- og streymlíkindi ikki loyva so stórur finnum?

Tad kann væl hugsast

Hvør kann svara slíkum spurningum? Og er tað møguligt at fáa svarað slíkum spurningum?

Sum sagt, havi eg prøva at svara eftir besta førimuni. Prøvi at fáa fatur á Smyril Line mánadagin, teir hava væl brúkt rágevarar medan teir hava leita.

Vinarliga Conrad Gaard Joensen

Vh Helena Dam á Neystabø

---

**Fra:** Hilmar Høgenni
**Sendt:** 5. juni 2008 17.22
**Til:** fundur@tinganes.fo
**Cc:** Journalin Innlendismálaráðið
**Emne:** upprit til landsstýrisfund um dokking av Smyrli

Upprit til landstýrisfynd har biði verður um undirtøku fyri fíggjarnevndarskjalu ísv. dokking av Smyrli